


Pieter Schelte kemur til Rotterdam. Mynd: EPA/ROBIN VAN LONKHUIJSEN

# Heimsins størsta tvíkilja er komin til Evropa

**Jógvan Hugo Gardar**

10.01.2015 - 14:25

Oljan.fo

Hósdagin kom tað sum verður kalla heimsins størsta skip, tvíkiljan Pieter Schelte, til Evropa og heimbýin Rotterdam. Skipið er bygt í Asia, og bleiv gjørt endaliga klárt á skipasmiðjuni hjá Daewoo í Suður-Korea áðrenn tað setti kósini móti Evropa um hálvan november. Nú skal tvíkiljan gerast endaliga klár í Hollandi, áðrennhon kann fara til verka.

Tað er Allseas sum eigur risatvíkiljuna, ið fær eitt sergjørt havnapláss gjørt til sín í Alexiahaven.

LES EISINI:Sjónband: Heimsins størsta skip á veg til Evropa

Pieter Schelteer 320 metrar til longdar, 127 metrar breiður og 70 metrar høgur.

Pieter Schelte skal kunna lyfta 48.000 tons, og er serútgjørdur til at kunna lyfta boripallar í Norðsjónum í einum.

*Upprunagrein løgd út 10. Jan. 2015 - 07:54*











